

www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 06 - 2012

# Kinverjar brúka Føroyar sum umskipingarstøð

Nú skip skjótt fara at sigla gjøgnum norður-vestur passasjuna fara Føroyar at liggja sera væl fyri sum umskipingarøki á hesi farleið. Tíí ætli eg mær at taka spurningin um vinnuliga møguleikan at gera ein umskipingarterminal í Føroyum við eina kinesiska sendinevnd, sum kemur til Føroya í næstum, sigur Johan Dahl, landsstýrismaður við oljan.fo Broytingar í Arktis og møguleikar Nógv fokus er í hesum døgum á nýggju vinnulívsmøguleikarnar í kjalarvørrinum á veðurlagsbroytingum í Arktis. At ísurin bráðnar hevur fingið londini í Arktis at síggja nýggjar vinnumøguleikar, eitt nú nýggjar og skjótari siglingarleiðir úr Europa til Asia og atgongd til olju og gass. Hetta er so eisini nakað, sum landsstýrið fylgir væl við í. Herfyri setti tað ein bólk at gera eina frágreiðing um, hvussu Føroyar skulu fyrihalda seg til veðurlagsbroytingarnar og teir vandar og møguleikar hesir hava við sær fyri eitt nú Føroyar. Johan Dahl umsitur vinnumál í Tinganesi og dylur hann ikki fyri, at hann fylgir sera væl við gongdini saman við restini av landsstýrinum við løgmanni á odda. Komandi vikuskifti koma umboð fyri kinesiskar myndugleikar og vinnu á vitjan í Føroyum. Tey fara so fyrst og fremst at hyggja at føroysku alivinnuni, men Johan Dahl, sum skal hitta kinesisku umboðini mánadagin í næstu viku, ætlar sær eisini at taka upp onnur vinnumál við forkunnugu og sjáldsomu gestirnar. Og hesi hava m.a. nakað við broytingarnar í Arktis at gera umframt leiting eftir kolvetnum í føroysku undirgrundini. Landsstýrismaðurin við vinnumálum , sum fer at hitta kinversku delegatiónina mánamorgunin, fer at tosa um samstarv innan ymisk øki og m.a. vísa á vinnuliga møguleikan at gera ein umskipingarterminal i Føroyum, nú veðurlagsbroytingar gera, at skip skjótt fara at sigla gjøgnum norður-vestur passasjuna. Føroyar liggja serstakliga væl fyri sum umskipingarøki á hesi farleið sigur landsstýrismaðurin við oljan.fo Kunna um oljuleiting Hann ætlar sær so eisini at greiða kinverjum frá

oljuleitingini við Føroyar, har stór oljufeløg sum Statoil og ExxonMobil vísa økinum stóran áhuga. Vit eiga at nýta slík høvi sum hetta at kunna um møguleikarnar at finna olja og gass í okkara undirgrund, nú Føroyaøkið er eitt av teimum fáu ótroyttu økjunum, ið eftir eru í heiminum, sum mett verður kann goyma stórar fjaldar nøgdir av kolvetnum. Eg fari at kunna gestirnar um Open door møguleikan, har oljufeløg skjótt og lætt kunnu koma inn á landgrunnin og bora. Eisini fari eg at tosa um framtíðar samvinnumøguleikar og harímillum er ein vónandi komandi oljuvinna. Kort Føroyar fara at liggja sera væl fyri sum umskipingarstað, tá siglingarleiðirnar í Arktis verða tøkar heldur Johan Dahl. (Arkivmynd)